# Bíbliur yvir Føroyar



Enn einaferð verða Føroyar bíbliubumbaðar. Hesaferð ókeypis av Sjúrði Højgaard



## Ole greiðir frá um Ísrael

Ole Andersen, aðalskrivari hjá danska felagsskapinum "Ordet & Israel", fer um vikuskifti at tala á Toftum. Evnini, ið hann fer at viðgera, hava øll við Ísrael at gera. Eisini verður aktuella støðan í Ísrael lýst.

Byrjað verður fríggjakvøld kl. 20 og hildið á leygardagin kl. 16 og kl. 20 og sunnudagin kl. 18, umframt at gestatalarin prædikar í Fríðrikskirkjuni sunnudagin.

Talarin Ole Andersen hevur verið nógv í Ísrael, hann er væl inni í Bíbliuni, og hann er eisini ein frálíkur undirvísari. Hann fer at tala um bíbilsk evni, ið hava við Ísrael at gera, umframt at hann eisini lýsir aktuellu støðuna.

Nógvur sangur verður eisini til tiltøkini og tað eru kór, bólkar og einstaklingar á Toftum, ið syngja.

Skráin fyri vikuskiftismøtini er henda:

Fríggjakvøldið "Ísrael í Guds stóru ætlan fyri allan heimin", Tofta streingjakór syngur.

Leygardagin kl. 16: "Tann seinasti og stóri bardagin um Jerúsalem og vekingin í Ísrael", Petur Hans Hansen syngur. Kunnan um arbeiðið hjá Ordet & Israel og Ísraelsmissiónini. Kl 20 "Ísrael - ein spennandi uppgáva hjá okkum kristnu", Leila Højgaard syngur

Sunnudagin kl. 18: "Støðan í Ísrael júst nú", Taborkórið og The Gadders syngja

Tað er Missiónshúsið á Toftum saman við Ísraelsmissiónina, sum skipa fyri tiltakinum.

## Í MORGIN




Fyrrapartin stívt andøvsgul upp í hvassan vind av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin veksur hann vindin upp í skrið av útsynningi og regn. Hitin millum 5 og 8 stig.

## FRÍGGJADAGIN




Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi, seinnapartin minni vindur av vestri. Yvirthøvur turt og sólglottar og hitin millum 8 og 11 stig.

## LEYGARDAGIN




Lot til andøvsgul av útsynningi, seinnapartin upp í stívt andøvsgul av suðri. Yvirhøvur turt og sólglottar.. men mjørki í støðum. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsyningi, mánadagin upp í hvassan vind av suðri. Regn ella ælingur og hitin milum 4 og 8 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýstið, 978 hPa. norðanfyri Føroyar fer í landnyrðing.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið við Hvarvið fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður við Føroyar hósdag seinnapart.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 88 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | -9 | Tromsø | -1 | Moskva | -13 | Athen | 14 |
| Reykjavík | 8 | Bergen | -2 | Berlin | -6 | Beijing | 11 |
| Tórshavn | 7 | Oslo | -9 | Paris | 3 | New Dehli | 20 |
| Lerwick | 4 | Stokkhólm | -6 | Madrid | 15 | Bangkok | 32 |
| Aberdeen | 7 | Keypmannah. | -4 | Róm | 11 | Sydney | -- |
| London | 8 | Helsinki | -19 | Malorca | 15 | New York | 2 |

## VESTFALLSKYRRINDI

2. apríl — Mánin longst frá jørðini
3. apríl — Tendring
11. apríl — Fyrra kvarter
17. apríl — Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2011

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6. apr | 09:16 | 21:37 | 08:16 | 20:37 | 08:31 | 20:52 | 11:16 | 23:37 | - | 12:16 | 07:31 | 19:52 | 06:31 | 18:52 | 09:31 | 21:52 | 10:31 | 22:52 | 09:01 | 21:22 | 10:16 | 22:37 |
| 7. apr | 09:59 | 22:21 | 08:59 | 21:21 | 09:14 | 21:36 | 11:59 | - | 00:37 | 12:59 | 08:14 | 20:36 | 07:14 | 19:36 | 10:14 | 22:36 | 11:14 | 23:36 | 09:44 | 22:06 | 10:59 | 23:21 |
| 8. apr | 10:44 | 23:07 | 09:44 | 22:07 | 09:59 | 22:22 | 00:21 | 12:44 | 01:21 | 13:44 | 08:59 | 21:22 | 07:59 | 20:22 | 10:59 | 23:22 | 11:59 | - | 10:29 | 22:52 | 11:44 | - |
| 9. apr | 11:31 | 23:56 | 10:31 | 22:56 | 10:46 | 23:11 | 01:07 | 13:31 | 02:07 | 14:31 | 09:46 | 22:11 | 08:46 | 21:11 | 11:46 | - | 00:22 | 12:46 | 11:16 | 23:41 | 00:07 | 12:31 |
| 10. apr | - | 12:21 | 11:21 | 23:45 | 11:36 | - | 01:56 | 14:21 | 02:56 | 15:21 | 10:36 | 23:00 | 09:36 | 22:00 | 00:11 | 12:36 | 01:11 | 13:36 | - | 12:06 | 00:56 | 13:21 |